# Teir stóru keypa teir smáu

**Ein norskur útróðrarmaður hevur fingið eitt boð uppá 34 milj. krónur fyri ein gamlan, men umbygdan bát, sum er verdur 8-10 milj. krónur**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*

Eitt afturvendandi kjak í fiskivinnupolitikkinum í fleiri londum um okkara leiðir er spurningurin, hvør skal eiga og veiða tilfeingið, sum svimur í havinum.

Í Íslandi hevur nógv verið frammi um, at tey stóru reiðaríini hava uppkeypt tey smáu, soleiðis at rætturin til tilfeingið er savnaður á færri hondum. Somu gongd hava vit sæð í Føroyum, og somu gongd síggja vit í Noregi.

Í Noregi heldur onkur útróðrarmaður, at einasta gongda leiðin er, at kvotan verður tillutað hvørjum manni sær, soleiðis at øll fiskirættindi við tíðini ikki enda í hondunum á teimum stóru feløgunum.



*Í Noregi vilja tey stóru reiðaríini geva nógvan pening fyri at sleppa at uppkeypa rættindini hjá teimum smáu.*

## Tríggjar ferðir

Útróðrarmaðurin, Tore Hillersøy í Tromsø, sigur, at hann og bróðurin eiga ein gamlan, men umbygdan útróðrarbát, sum er 40 føtur langur.

– Vit hava fingið eitt boð uppá bátin uppá 34 milj. krónur, sum er meira enn tríggjar ferðir tað, sum báturin er verdur, sigur hann.

– Seldu vit bátin, sigur Tore Hillersøy, kundu hann og bróðurin gjørt heilt onnur ting her í lívinum – og ikki verið fiskimenn meira.

Men samstundis høvdu teir møguleikar, sum útróðrarbáturin hevur í dag og tað, sum útróðrarvinnan skapar, endað á hondunum hjá teimum stóru feløgunum í norsku fiskivinnuni.

# Danir positivir um eitt størri ES

**Tá ið eystursjóvarlondini eru vorðin limir í ES, verður umsitingin av Eystursjónum ein samráðingarspurningur millum ES og Rusland**

DANMARK
*Vilmund Jacobsen*

DFE í Danmark, sum er Dansk Fiskeindustri-og Eksportforening, heldur tað vera positivt, um ES-samveldið verður økt við tíggju londum í Eystur-og Miðevropu.



*Danska fiskivinnan væntar sær fyrimunir av einum øktum ES-samveldi, tí tá fella tollmúrar burtur.*

– Hetta fer at tæna donsku fiskivinnuni, heldur DFE.

Við eini víðkan av ES, sær danska fiskivinnan møguleikarnar við øktum marknaðum, tá ið tollmúrarnir, sum eru galdandi í dag, verða burtur.

Formaðurin í DFE, Peder Hyldtoft, sigur, at danir ikki minst hugsa um at fáa ein part av tí marknaði, sum Noreg hevur í Pólandi.

## Økt kapping

Vansin við einum øktum ES, heldur Peder vera, at danska fiskivinnan verður noydd at taka upp kappingina við nýggju limalondini, serliga Pólland.

Hinvegin halda danir eisini, at umsitingin av fiskiríkidøminum í eitt nú Eystursjónum verður greiðari, tá ið bæði Póllandi, Estland, Litavia og Latvia gerast limir í ES, har Danmark, Svøríki og Finland longu eru limir frammanundan.

Tá ið hesi londini eru vorðin limir í ES, verður umsitingin av Eystursjónum ein samráðingarspurningur millum ES og Rusland.

# Flyta meira fisk loftvegis enn sjóvegis

**Í ár er útflutningurin av feskum íslendskum fiski við flogfari størri enn flutningurin við skipi**

ÍSLAND
*Vilmund Jacobsen*

Íslendingar eru í størri og størri mun farnir at flyta feskan fisk av landinum við flogfari til marknaðirnar í Evropu og USA.

Tað tekur minni enn tvey samdøgur frá tí, at fiskurin er veiddur, til hann liggur í frystidiskunum hjá stóru matvøruketunum í Evropu og USA.

Íslendingar hava lagt so stóran dent á flutningin við flogfari í ár, at teir nú flyta størri nøgdir av feskum fiski loftvegis enn sjóvegis.

Útflutningurin av feskum íslendskum fiski er vaksin eini 30% seinastu 4-5 árini.



*Tað verður nokk ein tíð enn, áðrenn føroyskir feskfiskaútflytarar fara at flyta størri nøgdir av fiski við flogfari enn við skipi.*

# Ísland limur í ICCAT



*Íslendska tunfiskakvotan, sum fyrsta árið verður 30 tons, skal økjast javnt uppí 60 tons ár 2006.*

**Ísland er nú vorðið eitt land við strandarættindum til tunfiskaveiði í egnum sjógvi og í altjóða sjógvi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Altjóða felagsskapurin, ICCAT, sum umsitir tunfiskaveiðina í Norðuratlantshavi, hevur nú tikið Ísland upp sum lim við rættindum sum strandaland.

Hetta hendi á seinasta ársfundi hjá ICCAT, sum hildin varð herfyri.

Upptøkan merkir, at Ísland fær eina tunfiskakvotu, sum er góðtikin av altjóða felagsskapinum, og við hesi kvotu kunnu íslendingar nú fiska tunfisk í egnum sjógvi, eins og í altjóða sjógvi.

## Úr 30-60 tons

Fyrsta árskvotan hjá íslendingum er sett til 30 tons, men kvotan skal økjast javnt til ár 2006, tá ið hon verður 60 tons.



# Riggar væl við partnering

**Higartil hevur Føroya Tele havt góðar royndir við partnering byggiháttinum**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*



*Eftir byggiháttinum, sum Føroya Tele nýtir til nýggja høvuðssæti, sita øll við sama borð í planleggingini.*

Arbeiðið við at fyrireika byggingina av einum høvuðssæti til eina av landsins størstu fyritøkum, Føroya Tele, gongur eftir ætlan.

Byggiætlarnirnar snúgva seg um at gera ein 6.000 fermetrar stórar bygning í Klingruni í Hoyvík. Kostnaðurin fer væntandi at liggja um 100 milliónir.

Arbeitt verður eftir tí leisti, ið kallast partnering (partalag). Higartil hevur hetta hepnast óføra væl. Partnering snýr seg um, at Føroya Tele sum byggiharri samstarvar við eina entreprenør fyritøku og nakrar ráðgevar, og allar avgerðir verða tiknar í felag. Hesin mátin er valdur framum at gera avtalur við ein ella fleiri høvuðsentreprenørar.

– Tað er sjálvandi ein tilvenjing hjá øllum pørtum, men higartil hava vit merkt nógvar positivar reaktiónir, og arbeiðið gongur eftir ætlan, sigur Andras Róin, forstjóri fyri Føroya Tele.

Tað er so gott sum klárt at seta spakan í. Eftir ætlan skal stásiligi nýggi bygningurin standa liðugur á heysti í 2004.

Tað frættist eisini, at onnur í Føroyum hava víst vilja at hyggja nærri at hesum forkunnuga byggiháttinum, sum er kendur aðrastaðni frá eisini.

Bygningingurin skal vera høvuðssæti hjá Føroya Tele í framtíðini. Tað nógva av umsitingini og tað mesta av tøkniligu útgerðini fáa rúmd í nýggja høvuðssætinum.

Føroya Tele fer úr gomlu telegrafstøðini og bygninginum á Tinghúsvegnum, sum Løgtingið hevur yvirtikið. Øll tann tøkniliga útgerðin í hesum bygninginum verður koyrd burtur og nýggj útgerð sett upp í Hoyvík.

## FarIce

Ein onnur verkætlan, sum í hesum døgum upptekur tíðina hjá leiðsluni hjá Føroya Tele, er FarIce. Talan er um eina verkætlan, har lagdur verður ein nýggjur sjókaðal til alt telesamskifti úr Íslandi til Skotlands umvegis Føroyar.

Tann nýggi kaðalin fer væntandi at rudda verandi Cantat 3 kaðal úr minninum á teim flestu. Munurin á FarIce og Cantat er sum nátt og dagur. Kapasiteturin verður fyri sovítt óendaliga stórur, og hetta fer at merkja týðandi betringar.

Andras Róin sigur, at hetta arbeiðið gongur eftir ætlan, og miðjað verður ímóti at skriva undir sáttmálar 26. november, t.e. komandi týsdag.

Verkætlanin fer væntandi at kosta um 500 mió. Tann føroyski parturin verður 20% ella 100 milliónir. Allir føroyskir fjarskiftisveitarar eru við í føroyska partinum, men tað er eyðsæð, at Føroya Tele fer at eiga størsta partin av íløguni.

Ætlanin er at leggja kaðalin komandi summar. Kaðalin kemur á land í Føroyum í Funningsbotni.

# Oljumálningar í føgrum litum

**Emma Mathiasdóttir Heinesen sýnir hesa vikuni fram í Smiðjuni í Lítluvík**

FRAMSÝNING
*Heri á Rógvi*

Emma Mathiasdóttir Heinesen segði sítt arbeiði sum flogterna upp, tá hon fylti hálvtrýss. Nú nýtir so nógva tíð sum gjørligt til at mála.

Hon hevur leingi dámað væl at mála, men tað var ikki fyrr enn í 1998, at hon fyri fyrstu ferð sýndi fram alment.

Hon hevur eina framsýning á Norðoyastevnu á hvørjum ári, og nú leggur hon seg eisini eftir at hava eina framsýning hvørt ár í Smiðjuni í Lítluvík.

Hendan seinasta framsýningin hjá henni lat upp leygardagin. Framsýningin hýsir fjøruti oljumálningar. Í føgrum litum, sum Emma tekur til.



*Emma Mathiasdóttir Heinesen málar hvønn dag og roynir at nýta so nógva tíð sum gjørligt til málningalistina. Hennara verk kunnu síggjast í Smiðjuni í Lítluvík hesa vikuna*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Allir málningarnir eru málaðir í ár, og teir byggja heldur á søgur enn motiv, sigur Emma.

Hon er sjálvlærd sum málari, og hon hevur tikið okkurt kvøldskúla skeið.

Um summarið hevur hon sítt egna gallarí í Klaksvík, sum verður rópt fyri Gallarí Emma.

Hon spælir við tankanum um at fáa sær sítt egna fasta gallarí alt árið. Eisini hugsar hon nógv um at leggja leiðina til Italia á háskúla.

Framsýningin hjá Emmu er opin til og við hósdagin.

## Restorffs tikið við dóminum

**Restorffs bryggjarí ætlar sær ikki víðari við teirra málið um rúsdrekkalýsingar til landsrættin**

RÆTTARMÁL
*Heri á Rógvi*

Restorffs bryggjarí hevur avgjørt ikki at kæra dómin, teir fingu fyri ólógliga at lýsa við rúsdrekka í einari lýsing í Dimmalætting fyrr í ár, fyri landsrættin.

Dómur varð sagdur í málinum 1. november. Jørgen B. Petersen, sorinskrivari, dømdi Restorffs at gjalda eina bót áljóðandi 10.000 kr. fyri at hava lýst ólógliga. Afturat hesum skal P/F Restorffs bryggjarí eisini gjalda sakarmálskostnaðin. Hesin síðst nevndi kostnaðurin hava vit tó ikki fingið upplýst støddina á.

Óla Svenn Nolsøe og Johan Mortensen, sum mynda leiðsluna hjá Restorffs og eru tveir av eigarunum, siga við Sosialinum, at teir ikki ætla at fara víðari við málinum til landsrættin.

Eftir at dómurin varð sagdur varð biðið um umhugsunartíð. Hesa hevur bryggjaríið, ið varð dømt, nú brúkt til at avgera, at tikið verður við dóminum.

Ákæra er eisini reist móti Føroya Bjór. Hendan snýr seg eisini um blaðlýsingar. Bíðað verður eftir, at hetta málið skal koma fyri í Føroya rætti.